## Feriuavloysari

*Føroya Egg søkir eftir feriuavloysara í tíðarskeiðinum 1. juli til uml. 10. august 2002.*

*Viðkomandi skal hava koyrikort.*

*Ert tú álítandi og hevur hug at royna nakað nýtt í summarferiuni, so royn hettar.*

*Tú fært møguleikan at royna teg einsamallan í uml. 2 vikur frá uml. 15. juli til og við 30. juli 2002.*

*Arbeiðið fevnir fyri ein stóran part um at pakka egg og koyra tey til handlarnar og hava eftirlit við at alt virkar sum tað eigur.*

Føroya Egg av Velbastað

***P/F Føroya Egg***
***FO-176 Velbastaður***

## Brúktur BMW 523i

**bilurin er í sera góðum standi**




Árg. 03/96 km.108.00 kr. 280.000,-
Bilurin er í sera góðum standi.
Bilurin hevur nógva orginala eykaútgerð, so sum Anti spin, klima aut., 6xcd boks, fjarst. sentrallás, sleipi krók, tví deilt setur aftan, ski posa, alu felgur og eyka sett av felgum v/dekkum v.m.
(eyka útgerð fyri ca. 75.000,-)

**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

## Pedagogar

Tórshavar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Býlingshúsið undir Brúnni.

**Størvini eru:**
- tvey pedagogstørv, 30 og 35 tímar um vikuna í barnagarðsstovu, við 20 børnum at byrja 15. juni 2002
- eitt pedagogstarv 35 tímar um vikuna til barnagarðsstovu við 17 børnum at avloysa undir barsil frá 15. august 2002 at rokna

**Stovnslýsing**
Í Býlingshúsinum undir Brúnni ganga 47 børn. Umframt barnagarðsstovurnar er ein vøggustova við 10 børnum.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja:**
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum
- at tær dámar væl at vera úti saman við børnunum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Hervør Dam, leiðara, tlf. 31 91 80, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndum og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum undir Brúnni 9B, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. juni 2002.

S N A R S K I V A N

## Søkt verður eftir laboranti

Vit søkja eftir einum laboranti til starvsstovuna á Havsbrún. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Analysur av fiski, mjøli, lýsi og fóðri
- Alt vanligt analysuarbeiði.
- Luttaka í góðskuarbeiðinum á Havsbrún

**Vit rokna við at tú hevur**
- Útbúgving sum laborantur
- Aðra hóskandi útbúgving
- Góð samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 21. mai 2002. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkum, spyr eftir Gudny Rasmussen.

HAVSBRÚN
**pf Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 · Fax 414401
Mail: gur@havsbrun.fo

## Pedagogar

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir tveimum pedagogum til at byrja 15. august 2002.

Størvini eru fulltíðarstørv (40 tímar), annað starvið er í barnagarðinum, har ganga 20 børn í aldrinum 3 til 7 ár, og hitt starvið er í vøggustovuni, har ganga 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár.

Vit kunnu bjóða starv í einum lítlum stovni, har dentur verður lagdur á trivnað og gott samstarv og vænta vit eisini, at tú ert áhugað/ur at skapa trivnað, er kreativ/ur og hevur góð samstarvsevnir.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 13. juni 2002.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri stovnin Jónu Jacobsen á tlf. 421660.

## Avloysari

Søkt verður eftir einum fólki skjótast tilber, ið kann virka sum avloysari tá starvsfólk á stovninum eru burtur vegna frítíð, sjúku o.a.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri stovnin Jónu Jacobsen á tlf. 421660.

**Kvívíkar kommuna**

## M/S Teistin

Søkt verður eftir hjálparfólki til M(S Teistan, Skopunarfjørð.
Arbeiðið umfevnir sølubúð/matgerð.

**tlf. 211099**

## Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur fra SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 11. og 12. juni 2002 og á **Landssjúkrahúsinum** 13. juni 2002.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, týsdag og mikudag kl. 10-12, í seinasta lagi 05. juni 2002.

## Hús í Klaksvík til sølu

Ognin matr. nr. 1334 Kjalarvegur 27 til sølu um hóskandi boð fæst.

| | |
|---|---|
| Grundøki: | 371 m² |
| Húsini: | 8x11 m í tveimum hæddum |
| Hjallur: | 3x3 m |

Báðar hæddirnar innrættaðar.

Húsini eru bygd úr betongi í 1953, og eru takt við asbesti.

**Eyðfinnur Hansen**
Grønaból · Klaksvík
tlf. 456439 ella 222755

Sosialurin -har tað hendir



# Vikuskifti

Nr. 93 • leygardagur • 18. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


### Skeivt altíð at halda seg hava rætt

- Fólk, sum altíð halda seg hava rætt, eru ring at samstarva við og gerast ofta einsamøll, heldur eiðisprestur, Emil Olsen

Lesið síðu 3





# Emma fylti Lágargarð

Vetrarhálvuna skipar Lágargarður fyri hugnakvøldum fyri búfólkum og avvarðandi. Hetta hevur verið siður heilt síðani Lágargarður byrjaði fyri 14 árum síðani, og er hetta tiltakið ógvuliga væl dámt bæði av teimum, ið búgva har, og familjuni

ELDRALÍV
*Ingrid Bjarnastein*

Nógv ymiskt er á skránni, tá hugnakvøld er. Tað vanliga er, at køkurin ger drekkamunn við einum køkubita, men í november, tá slaktið hevur verið, borðreiða tey á Lágargarði við drýli við føroyskum viðskera. Og til dømis í januar, so verður borðreitt við føroyskum mat, sum tey avvarðandi sjálvi hava við. Á hetta hátt verða hugnakvøldini fjølbroytt og spennandi.

Hugnakvøldini byrja klokkan 19 og enda um klokkan 21.

– Hetta riggar ógvuliga væl, sigur Marjun Smith, sum er leiðari á Lágargarði.

– Øll møtast, og hetta fungerar næstan sum ein café, har tey avvarðandi hugna sær saman við familjuni og undirhaldinum, sum er á skránni. Undirhaldið er fyri tað mesta sangur og tónleikur, tí tað er tað, sum er best dámt. Onkuntíð hava vit onkran at lesa okkurt upp, og til dømis í februar mánaða hava vit eitt dansifelag, sum dansar og kvøður fyri okkum.

Bæði búfólk og familja dáma hetta tiltakið ógvuliga væl. Hetta gevur teimum møguleika at hitta onnur, og koma saman til eina hugnaliga løtu.

### Emma og tey

Til at seta punktum fyri vetrarhálvuna í ár, hevði Lágargarður fingið vælumtóktu M´as Blues Band at koma at spæla nøkur løg. Tey vistu frammanundan, at áhugin fyri hesum var ógvuliga stórur, og tí máttu tey avmarka talið av teimum avvarðandi til ikki meira enn fýra persónar, soleiðis, at pláss skuldi verða fyri øllum.

– Tað hava ongantíð verið so nógv fólk til hugnakvøld, greiðir Marjun Smith frá. –

- Vit vóru heili 150 fólk, og tað var ein heilt fantastiskur stemningur. Emma og hennara fólk vóru so lívlig, glað og spontan, og tey kókaðu av lívi. Øll klappaðu og sungu við í sangunum, og vit eru ógvuliga glað fyri hetta tiltakið. Tey vaktu virkuliga tað ungu sálina í teimum gomlu.

Marjun sigur, at tónleikur er so væl egnaður til eldri fólk. Tí sjálvt um fleiri eru dement og gloyma skjótt, so er tónleikur altíð nakað tey kenna aftur. Tey duga at syngja við teimum gomlu sangunum, og sjálvt um næstan alt er farið, so stendur sangurin eftir.

– Eisini tann sosiala samveran við familjuna, tað at hittast og tosa saman hevur nógv at siga fyri tey. Og nú tá M´as Blues Band var, so noyddust vit eisini at seta eyka stólar og borð upp. Vit eru heilt vís í, at hetta var tí tað var M´as Blues Band, sum skuldi spæla.

Hugnakvøldini á Lágargarði verða væl vitjað og eru eisini væl dámd. Bæði búfólk og familja gleða seg til hetta, og tey vera kedd um avlýst verður.

– Sjálvt um tey hava gloymt tað eina lítla løtu aftaná tað er hent, so eru tey glað ta løtuna hugnakvøldið er, og tað er tað, sum telur, sigur Marjun Smith.

Hugnakvøldini eru nú farin í summarfrí, men verða aftur á skránni, tá myrkari verður í veðrinum í september mánaða.